## Nýggja viðgerðarheimið



Soleiðis er hugsandi at bygningurin kemur at síggja út. Enn eru tó ikki avgjørt endaliga um smálutir í sniði, tilfari og litum.

### Fakta um ætlanina

- Bygningurin er umleið 800 fermetrar í einari hædd.
- Verður bygdur á Gadd á Nesi í Eysturoynni í vøkrum umhvørvi.
- Tað vera 12 búrúm, sum øll hava WC og bað, umframt rúm til avrúsan.
- Viðgerðarrúm, skrivstovur og venjingarrúm.
- Samlaður kostnaður fyri ætlanina er mettur til 10 mio.
- Blái Krossur hevur savnað 1 mio. kr. og skal savna minst 2 mio inn afturat.
- Ætlanin er at byrja byggingina um 1 ár.

### Fakta um tørvin

- Seinatu 5 árini hava í miðal verið 120 persónar í viðgerð um árið.
- Seinastu 5 árini hava í miðal verið 180 innleggingar á Blákrossheimið um árið.
- Parturin av ungum, sum leita sær viðgerð, hevur verið vaksandi seinastu árini. Í 2010 vóru 36 % fólk undir 40 ár.
- Umleið helvtin av teimum, sum leita sær viðgerð, eru millum 40 og 60 ár.
- Ein vanlig viðgerð tekur 12 vikur.
- Seinastu 3 árini hevur Blákrossheimið havt samband við millum 10 og 20 ung undir 18 ár, sum hava rústrupulleikar.